TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 08.03.2021 kl. 19:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 14/21 | 20/00362-3 | Tilboð um keypa av matr.nr. 492a -TF.Thomsen |
| **Til kunningar** | | |
| | | |

Til støðutakan

**14/21**
**20/00362-3 Tilboð um keypa av matr.nr. 492a -TF.Thomsen**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 08.03.2021 | 14/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 05.03.2021 | 11/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 11.01.2020)**
Bygningarnir og fiskaplássið er søguliga sæð millum mest áhugaverdu bygningar í landinum, og lýsa hesar ognir politisku søguna um Kongaliga Einahandilin; vinnusøguna um tá Føroyar fóru frá landbúnaði til fiskivinnu; søguna um Føroya fyrstu veruligu arbeiðarastætt; um Føroya fyrstu fakfeløg og um tað mentanar- og ítróttarlív, sum spratt á Tvøroyri.

Borgarstjórin og kommunustjórin hava síðani juni 2020 samskift við verandi eigara av ognini matr. nr. 492a, Coldstream Sp/f, um keyp av parti av ognini hjá fyrrv. T.F. Thomsen á havnalagnum á Tvøroyri. (Fiskapláss, Gl. Kgl. Handil, Seglloft, Pakkhús nr. 4 og Pakkhús nr. 5.)

**Frágreiðing til málið**
Samráðingarnar eru komnar í lag, eftir at umsitingin vendi sær til eigaran í mai 2020 við fyrisp. um áhugi var fyri at selja fiskaplássið og Pakkhúsið nr. 4, sum kommunan hevur leiga til ungdómshús í fleiri ár.

Coldstream Sp/f boðaði frá, at teir ikki ynskja at selja partar burtur úr ognini, men at teir eru áhugaðir í, at selja alla ognina undir einum. Hetta serliga orsakað av, at teir hava áhuga í, at ognin verður varðveitt í sínum uppruna, og meta teir eisini, at Tvøroyrar kommuna er rætti eigarin, sum kann tryggja at so verður, júst í trá við ynskið hjá Poul Hansen, sum keypti hesa í sínari tíð.

Samráttst var við eigaran við atliti til standin á ognunum, og tað, at talan er um ogn, sum er friða samb. LL. Nr. 19, frá 16. sep. 1948 um friðan av fornminnum og bygningum við seinni broytingum frá 2. Juni 1970 og 19. Apríl 1972. Eisini hevur fundur verið við Tjóðsavnið fyri at fáa lýst støðuna viðv. friðing. Niðurstøðan hjá Tjóðsavninum er, at hóast endamálið við friðingini er at varðveita ognirnar í tí søguliga skapinum tær eru í, er friðingin ongin forðing fyri, at ognirnar verða brúktar, og koma borgarum og plássinum til góðar. Tvørturímóti ynskir Tjóðsavnið virksemið í bygningunum og upplýsir, at tað ber væl til at fremja broytingar og tillagingar, soleiðis at ogninar samsvara við tíðarinnar tørv og krøv. Tað skal tó gerast við umhugsni og samráð við Tjóðsavninum, samb. LL. um friðan av bygningum.

Umsitingin sær fiskaplássið, Gl. Kgl. Handil, Seglloft og Pakkhúsini sum sannar perlur, eins og Tinganes er tað í Tórshavn, og við Tvøroyrar kommuna sum eigara vera ogninar hildnar og framtíðartryggjaðar til almannagagnliga nýtslu.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Kommunan leigar sum er part av Pakkhús 4 til ungdómshús, fyri kr. 15.000,-/mnd. og kommunan yvirtekur 2 leigumál, sum eru í ognini, ið samla ljóða uppá kr. 15.000,- mnd.

*Íløga:*

Ongin upphædd er avsett til keypið á fíggjarætlanini fyri 2021. Fundur hevur verið við lánveitaran hjá kommununi, og tilmælið er at fíggja keypið við at hækkað verandi lán tilsvarandi keypsprísin. Hetta kemur ikki at ávirka gjaldføri hjá kommununi, men krevur eina eykajáttan.

*Rakstur:*
Talan er um gamlar søguligur bygningar, og seljarin hevur gjørt vart við, at neyðugt er at fremja ábøtur á hesar. Partur av tekjuni og klædninginum er í ringum standi, serliga á Gl. Kgl. Handli og Pakkhús 5, og neyðugt er sum skjótast at fremja ábøtur á hesar.

**Lógar grundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Tilmæli:**
Umsitingin mælir til at Tvøroyrar kommuna keypir ognina, samb. keypsavtaluna dagf. 15.02.2021, hetta serliga grunda á, at ogninar eru partur av miðbýnum á Tvøroyri, og eru við til at ímynda samleikanum fyri Tvøroyri.

Tilmælið er at ogninar framhaldandi vera brúktar, um enn meira sum savn, og at hesar vera karmur um mentanarlig tiltøk, til gagn fyri fólk á staðnum og fyri ferðafólk.

**Til støðutakan:**
1. Keyp av matr. nr. 492A, samb. keypssáttmála dagf.. 15.02.2021.
2. Eykajáttan til keyp av matr.nr 492A.

**Fíggjarnevndin 05. marts 2021:**
Kristin Michelsen, Jónleyg Bech mæla til at kommunan keypir matr. nr. 492A, samb. keypssáttmála dagf.. 15.02.2021. -Bjarni tekur støðu á býráðsfundi.

Kristin Michelsen, Jónleyg Bech mæla til at veita eykajáttan til keyp av matr.nr 492A og at keypið verður fíggja við lántøku. -Bjarni tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðið 08. marts 2021:**
Súsanna Bertholdsen mælir til at málið verður beint í Mentanarnevndina
Fyri eru: Súsanna Bertholdsen, Kristina Roest og Bjarni Hammer
Ímóti eru Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg J. Bech og Alvi Mortensen
**Uppskotið er harvið fallið**

Kristin Michelsen mælir til, at býráðið tekur undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndi har Tvøroyrar kommuna keypir matr. nr. 492A, samb. keypssáttmálan dagf.. 15.02.2021, fyri kr. 4,4 mió.
Atkvøtt var um tilmælið hjá fíggjarnevndini, fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg J. Bech og Alvi Mortensen
Ímóti eru: Kristina Roest og Súsanna Bertholdsen
Stemma blankt: Bjarni Hammer
**Uppskotið er harvið samtykt**

Kristin Michelsen mælir til, at býráðið tekur undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini at veita eykajáttan til keypið av matr.nr 492a, sum verður fíggja við lántøku.
Atkvøtt var um tilmælið hjá fíggjarnevndini, fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Jónleyg J. Bech, Alvi Mortensen og Bjarni Hammer
Ímóti eru: Kristina Roest og Súsanna Bertholdsen
**Uppskotið er harvið samtykt**

Til kunningar

Fundurin lokin kl. 19:28

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen